## Egil á Bø heldur fram

Nú er endaliga greitt, at Egil á Bø eisini verður at síggja í Vodafonedeildini í 2010. Heimasíðan hjá EB/Streymi skrivar, at 35 ára gamla verjukempan hevur longt avtaluna við einum ári. Egil endaði annars kappingarárið í fjør við at skora sítt fyrsta landsliðsmál, sum var á útivølli ímóti Rumenia. Somuleiðis halda Gert Hansen og Arnar Dam fram í EB/Streymi.



## Eyðun og Andreas til Íslands

Føroyska altjóða hondbóltsdómaraparið, Eyðun Samuelsen og Andreas F. Hansen, skal 13. februar til Íslands at døma áttandapartsfinalu í Challenge-Cup í kvinnuhondbólti millum Fram og RK Tresnjevka úr Kroatia. Hetta er fimta altjóða uppgávan, dómararnir báðir fáa hetta kappingarárið, og hetta er aðru ferð í tvey ár, at teir døma eina áttandapartsfinalu í europeiskum høpi.



Rennararnir stríðast ímóti vindinum í Skálafirði á hálva maratonteininum, sum varð runnin frá Funninsfirði út á Toftir

Mynd: Guttorm Sørensen

### Veðrið var ikki tað besta

# Eirikur bestur í mótvindinum

**til renning, og tað sást aftur í tíðunum, ið ikki blivu serliga góðar í nógva mótvindinum frá Funningsfirði út á Toftir. Men tað tekur einki frá sannførandi sigrinum hjá Eiriki Hansen – fýra minuttir framman fyri nummar tvey**

Tvær ferðir varð kappingin avlýst



Hilmar Jan Hansen

fyri veður, og tá hon endiliga var gjøgnumførd leygardagin, var veðrið nú heldur einki at reypa av. Gamaní, vóru hálkan og kavin ikki nakar trupulleiki, men hinvegin var nógvur vindur – og hann var ímóti allan samlan teinin, frá startinum og til málið!

Hetta sást eisini aftur á tíðunum, sum av tí sama ikki kundu gerast serliga góðar. Eitt nú var vinnaratíðin hesa ferð næstan 20 minuttir verri enn fyri einum ári síðani, men tað skal ikki standa rennarunum til last, tí teir royndu at kýta seg og berjast sum frægast ímóti mótvindinum.

Greitt var somuleiðis, at ein nýggjur vinnari fór at verða funnin, tí eingin av teimum níggju fremstu í Nýggjárshálvmaraton í fjør var við hesa ferð.

Tá starturin gekk einar 500 metrar inni á Funningsfjarðarvegnum, vóru 24 mannfólk og eitt konufólk til reiðar at herja á teir 21,1 kilometrarnar, sum teinurin fevndi um – umvegis niðara Søldarfjarðarvegin og Fjørðuvegin í Runavík – út á málið á Toftakei.

### Skjótt á odda

Beinanvegin sást, at Eirikur Hansen, Andrass Joensen og Jonhard Larsen vóru teir, ið løgdu mest fyri, og teir tríggir vóru eisini fremstir mestsum allan vegin. Tá avtornaði, vóru tað eisini teir, ið endaðu á sigurspallinum við ávikavist gull-, silvur- og bronsumerkjum.

Aftan fyri hesar tríggjar var eitt felt, ið helt seg samlað nokk so leingi, men tó nokk so skjótt dragnaði frá trimum teimum fremstu. Millum teirra, sum vóru í feltinum, var einasta kvinnan, Helga Súsanna Johansen, umframt Trygva Hansen, Dan Knudsen, Gunnar Dahl-Olsen, Jóhan M. Jacobsen og aðrar. Út ímóti Skipanesi nærkaðist feltið aftur teimum trimum fremstu, og Trygvi Hansen fekk í Søldarfirði fatur í Jonhard, men mátti lúta, tá teir fór niðan gjøgnum Byrgisbrekkuna úr Søldarfirði.

Heilt har frammi økti Eirikur Hansen um munin aftur til Andrass Joensen, ið aftur var eitt fitt petti framman fyri Jonhard Larsen. Sum sagt, gjørdust hesir tríggir teir fremstu um málstrikuna, í nevndu raðfylgju.

Andrass Joensen vann somuleiðis innanhýsis kappingina hjá veteranunum framman fyri Dan Knudsen og Óla Jákup Kristoffersen, og hjá superveteranunum var Ólavur Herup Olsen framman fyri Regin Jóanesarson. Helga Súsanna Johansen var einasta kvinnan, og gjørdist hon tí vinnari har – enntá við einari heilt góðari tíð, hóast tað annars ikki eyðkendi kappingina leygardagin.

## Nýggjárshálvmaraton 2010

**Kvinnur – opin bólkur**

| Nr. | Tíð | Navn | Árgangur | Felag |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 1.49,24 | Helga Súsanna Johansen | 1981 | Treysti |

**Menn – opin bólkur**

| Nr. | Tíð | Navn | Árgangur | Felag |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 1.34,40 | Eirikur Hansen | 1980 | Bragdið |
| 2 | 1.38,47 | Andrass Joensen | 1963 | Bragdið |
| 3 | 1.44,24 | Jonhard Larsen | 1966 | Treysti |
| 4 | 1.46,11 | Trygvi Hansen | 1966 | Bragdið |
| 5 | 1.46,36 | Gunnar Dahl-Olsen | 1965 | Bragdið |
| 6 | 1.47,17 | Dan Knudsen | 1962 | Bragdið |
| 7 | 1.47,38 | Jóhan M. Jacobsen | 1966 | Treysti |
| 8 | 1.48,54 | Eirikkur Joensen | 1967 | Roysnið |
| 9 | 1.49,27 | Jóhan E. Simonsen | 1969 | Bragdið |
| 10 | 1.51,01 | Heini Heinason | 1970 | Treysti |
| 11 | 1.52,19 | Eli Jógvanson Christiansen | 1985 | Tórshavn |
| 12 | 1.53,17 | Arnfinn Johannessen | 1965 | Tórshavn |
| 13 | 1.53,46 | Óla Jákup Kristoffersen | 1959 | Bragdið |
| 14 | 1.53,58 | Kári Simonsen | 1959 | Bragdið |
| 15 | 1.54,04 | Niels Hansson | 1964 | Bragdið |
| 16 | 1.58,04 | Magni Jacobsen | 1976 | Skáli |
| 17 | 1.58,04 | Evald Rasmussen | 1956 | Bragdið |
| 18 | 2.03,43 | Súni Christiansen | | |
| 19 | 2.03,43 | Terje Hansen | 1968 | Treysti |
| 20 | 2.10,46 | Ólavur Herup Olsen | 1943 | Bragdið |
| 21 | 2.12,00 | Jón Rasmussen | 1967 | Treysti |
| 22 | 2.14,20 | Theodor Askham Olsen | 1958 | Treysti |
| 23 | 2.24,30 | John Vangberg Petersen | 1968 | Treysti |
| 24 | 2.38,39 | Regin Jóanesarson | 1945 | Treysti |

**Menn – veteranar**

| Nr. | Tíð | Navn | Árgangur | Felag |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 1.38,47 | Andrass Joensen | 1963 | Bragdið |
| 2 | 1.47,17 | Dan Knudsen | 1962 | Bragdið |
| 3 | 1.53,46 | Óla Jákup Kristoffersen | 1959 | Bragdið |
| 4 | 1.53,58 | Kári Simonsen | 1959 | Bragdið |
| 5 | 1.58,04 | Evald Rasmussen | 1956 | Bragdið |
| 6 | 2.14,20 | Theodor Askham Olsen | 1958 | Treysti |

**Menn – supervetaranar**

| Nr. | Tíð | Navn | Árgangur | Felag/Staður |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 2.10,46 | Ólavur Herup Olsen | 1943 | Bragdið |
| 2 | 2.38,39 | Regin Jóanesarson | 1945 | Treysti |

